# – Pávin gjørdi ikki mun á fólki

**– Tú fornemmar veruliga at pávin hevur áhuga í tær, tá tit tosa saman. Hann er nærverandi, og tá er líkamikið um tú ert lágt ella høgt í metum. Tá tit tosa saman, ert tú tann týdningarmesti persónurin av øllum, sigur katólski presturin, Lars Messerschmidt um pávan, sum andaðist leygarkvøldið. Hann hevur sjálvur hitt pávan tvær ferðir**

PÁVADEYÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Jóhannes Páll 2 var av sonnum ein pávi sum gav sær far um medmenniskju síni, sigur Lars Messerschmidt, katólskur prestur, sum tvær ferðir hesur heilsað uppá pávan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Nærverandi og seg sjálvur!

Hesar báðar eginleikarnar hjá Giovanni Paolo 2 páva eru teir, sum standa fremstir í huganum hjá Lars Messerschmidt, presti í Katólsku kirkjuni í Danmark.

Hann hevur sjálvur heilsað uppá pávan og hevur somuleiðis tosað við hann. Og bara út frá hesi samtaluni, sum ikki tók stórt meiri enn 10 til 15 sekund er Lars greiður í sínari niðurstøðu:

- Tú skalt ikki vera leingi saman við pávanum, fyrrenn tú merkir, at hann veruliga er nærverandi og ikki letur seg stýra av øðrum. Hann er seg sjálvur, sigur Lars.

Hann er prestur í Danmark, men kemur við ávísum millumbilum til Føroyar at hava gudstænastur fyri katolikkarnar í Føroyum. Hetta er serliga til tær stóru kristnu hátíðirnar, páskir og jól.

Í ár høvdu tey sínar gudstænastur sum vanligt á páskum, men við messuna sunnudagin var gjørt meiri burturúr deyða pávans, eins og biðið var fyri honum.

– Vit bóðu eisini um, at tann komandi pávin má verða ein góður hirði fyri allar katolikkar.

– Sjálvur fari eg ikki at seta fram nakað ynski um og til tann komandi pávan. Bara Gud veit, hvat vit hava brúk fyri, og tí kunnu vit trygt leggja alt hetta fram fyri hann í bøn, sigur Lars Messerschmidt, sum í dag kann hátíðarhalda 68 ára føðingardag sín.

Hann fór til Danmarkar aftur í gjár eftir hesa planløgdu vitjanina í Føroyum.

### 24 tímar áðrenn

Tað hevur verið frammi í eina tíð, at heilsustøðan hjá

# – Ein ótrúligur persónur

**– Tá vit komu fram til leguhúsið, var eingin pávi at síggja. Hann var tá steðgaður upp og var farin at tosa við fleiri av børnunum, ið stóðu framvið vegnum. Hetta hendi, hóast einki var skrivað um tað í skránni fyri vitjanini! Soleiðis var hann bara, sigur Lars Messerschmidt, katólskur prestur**

PÁVADEYÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað var spenningur í katólsku dómkirkjuni í Keypmannahavn henda junidagin í 1989.

Pávin var á vitjan í Norðurlondum og skuldi nú hava gudstænastu á hesum staði. Kirkjan var stúgvandi full av fólki, bæði tíðindafólkum og fólki, ið vóru komin til hesa hátíðargudstænastuna.

Endiliga er pávin her, og skráin fyri gudstænastuna kann byrja. Men hvat ger pávin? Hann brýtur alt tað fyriskrivaða, og fer beinleiðis fram á altarið at halda bøn.

Fólk gerast nervøs og ein ávísur spenningur tekur seg upp millum tíðindafólkini, tí hetta kom púra óvart á tey øll.

– Men soleiðis var hann bara. Hann fylgdi ikki altíð teirri fyrisettu skránni, men gjørdi tað sum hann føldi var rætt í tí støðuni, sigur Lars Messerschmidt, katólskur prestur.

Hann var sjálvur til staðar við hesa gudstænastuna, sum gav honum eitt sera gott innlit í persónligheitina hjá hesum pávanum, sum andaðist leygarkvøldið.

### Ikki lært leiklutin

Fyrru ferð teir hittust var altso í juni mánaði 1989, tá pávin var á vitjan í Norðurlondum. Hann vitjaði tá í øllum londum, uttan Føroyum og Grønlandi.

Í sambandi við vitjanina í Danmark fekk Lars tvey gylt høvi at læra henda megnarmannin at kenna – fyrst við eina gudstænastu í Keypmannahavn og síðani við eitt størri tiltak við eitt leguhús í Jútlandi.

- Og eg skal siga tær sum tað er: Tað var ein heilt ótrúlig uppliving at vera so nær hjá pávanum. Tí er tað nakað, sum eyðkendi henda mannin so var tað tætta samband hansara við fólkið, sigur Lars.

Undir hesi vitjanini í Norðurlondum helt pávin m.a. eina gudstænastu í katólsku dómkirkjuni í Keypmannahavn, har Lars eisini var við.

Her gjørdist Lars fult greiður yvir alt tað góða og positiva, hann hevði hoyrt onnur siga um pávan, - hansara nærvera og hansara persónligheit.

– Hann var til stóran íblástur fyri okkum øll, í tí hann segði og soleiðis sum hann var. Og hann vísti her til fulnar, at hann var ein maður sum hvíldi í sær sjálvum.

– Hann spældi ikki ein leiklut, ið hann hevði lisið seg til, ella sum onnur høvdu biðið hann um at vera. Hann var altíð seg sjálvur. Og tað haldi eg eisini, at luttøka hansara við gudstænastuna í dómkirkjuni vísti, bæði tíðindafólkum og teimum mongu, ið vóru komin til hesa serstøku gudstænastuna, sigur Lars.

### Broytt atmosfera

Í katólsku dómkirkjuni var alt gjørt til reiðar til hesa spennandi vitjanina. Og sum vera man vóru tíðindafólk og myndamenn í hópatali til staðar.

Øll bíðaðu tey eftir at pávin skuldi koma innar, og tí var ein ávísur nervøsitetur og spenningur í kirkjurúminum. Men tá hann so kom innar í kirkjuna, fór hann fyrst av øllum fram til altarið og legði seg á knæ í bøn. Har lá hann eina góða løtu.

Frammanundan hevði ein sett upp eina ætlan fyri, hvussu gudstænastan skuldi vera, bæði praktiskt og við tíðini. Men hetta, hann nú gjørdi kom púra óvart á øll: At hann skuldi falla á knæ frammanfyri altarið var fullkomuliga uttan fyri ta løgdu skránna!

– Men soleiðis var hann. Hann var seg sjálvur, og bakkaði ikki fyri at gera tað, hann sjálvur helt vera rætt. Eingin kundi pressa hann til nakað, sigur Lars.

Lars kom henda dagin at sita bara nakrar heilt fáar metrar frá altarinum, og hann merkti til fulnar tann intensa spenningin sum var í kirkjuna hesa løtuna.

Pávin lá soleiðis á altarinum í ein góðan minutt, meðan øll hildu andanum í tí, sum fyri tey helst hevur virkað sum ein ævi. Men tá pávin so fór á føtur aftur, var ein heilt onnur atmosfera inni í kirkjuni:

– Frammanundan vóru fólk nervøs og spent, men nú gjørdust øll meiri avslappað og rólig. Soleiðis var hann bara, sigur Lars, sum bara dugir at ímynda sær, at slíkar improvisa-